# Japansk oljuinnrás á Atlantsmótinum

**Faroe Petroleum hevur undirskrivað handilsavtalu við japanska oljufelagið Idemitsu, ið fær part í loyvispørtunum hjá Faroe Petroleum í fýra leitiloyvum á Atlantsmótinum eystan fyri føroyska markið**

OLJUHANDIL
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Faroe Petroleum, ið arbeiðir við verkætlanum innan oljuvinnuna og við serligum atliti at leiting, meting, menning og framleiðslu av olju og gassi á Atlantsmótinum, Norðsjónum og í Noregi, boðar frá, at tann fyrsta handilsavtalan um leitiloyvi á Atlantsmótinum nú er undirskrivað.

Avtalan, ið fevnir um fýra týdningarmiklar brunnar á Atlantsmótinum, er gjørd við japanska oljufelagið Idemitsu E&P UK, Limited, sum er eitt dótturfelag hjá Idemitsu Kosan Co. Ltd., eitt av leiðandi feløgunum innan orku og kemiskan ídnað, har olja verður nýtt sum rávøra.

Avtalan er í tráð við strategiina hjá Faroe Petroleum um at handla við leitiloyvum á ein slíkan hátt, at meginparturin av borikostnaðinum verður goldin av tí felag, sum fær lut í leitiloyvum, tó soleiðis, at Faroe Petroleum framhaldandi hevur ein týðandi part av loyvinum.

Handilsavtalan við Idemitsu fevnir um 4 bretsk leitiloyvi, ið liggja vestan fyri Hetland. Trý av loyvunum eru á tí lovandi Corona Rygginum, beint eystanfyri føroyska markið, og um somu leið har Chevron samtakið hevur funnið olju í Rosebank/Lochnagar fundinum og har Amerada Hess hevur funnið olju í Cambofundinum sigur Faroe Petroleum í tíðindaskrivi.

Loyvini, Idemitsu fær lut í, eru:

Tornado, har OMV er fyristøðufelag. Hini feløgini í loyvinum eru Dana Petroleum, og eftir handilsavtaluna hevur Faroe Petroleum 10% og Idemitsu 10%

Cardhu, har Shell er fyristøðufelag. Hini feløgini í loyvinum eru BP og Chevron, og eftir handilsavtaluna hevur Faroe Petroleum 5% og Idemitsu 5%

Lagavulin, har Chevron er fyristøðufelag. Hini feløgini í loyvinum eru OMV, og eftir handilsavtaluna hevur Faroe Petroleum 10% og Idemitsu 10%

Talisker, har Chevron er fyristøðufelag. Eftir handilsavtaluna hevur Faroe Petroleum 12,5% og Idemitsu 12,5%

Avtalan hevur við sær, at Idemitsu skal gjalda ein stóran part av tí kostnaði, sum er eftir av verkætlanunum á omanfyrinevndu loyvum. Við hesum verður kostnaðurin hjá Faroe Petroleum munandi lægri.

Um so er, at borað verður á teimum einstøku leitiloyvunum, skal Idemitsu eisini gjalda ein stóran part av borikostnaðinum hjá Faroe Petroleum.

Avtalan er tann fyrsta hjá Idemitsu í teirra ætlan um at virka á bretskum øki.



*Vit síggja fýra av loyvunum, har Faroe Petroleum hevur selt burtur av sínum parti til japanska oljufelagið Idemitsu*

### Stórt felag

Idemitsu varð sett á stovn í 1911, og virksemi hjá felagnum fevnir um allar greinar innan oljuvinnu, rakstur av kolanámum og kemiskum ídnaði, har olja verður nýtt sum rávøra. Í 2006 hevði felagið 4500 fólk í starvi, umsetti fyri 145 mia. kr. og hevði eitt yvirskot uppá 2 mia. kr. Marknaðarvirðið á felagnum er umleið 21 mia. kr. Felagið hevur leitivirksemi eftir olju í Noregi og Suðureystur Asia.

Avtalan er treytað av, at partnararnir í teimum ymsu loyvunum og bretsku myndugleikarnir (DTI) góðkenna avtaluna.

Henda avtalan er eitt týðandi stig á leiðini hjá Faroe Petroleum á Atlantsmótinum, har ætlanin er at gera líknandi avtalur við oljufeløg um, at tey kunnu fáa part í leitiloyvum hjá Faroe Petroleum ímóti at gjalda týðandi part av møguligum borikostnaði, tó soleiðis at Faroe Petroleum altíð hevur ein týðandi part av loyvunum eftir - men bert ein lítlan part av kostnaðinum sigur felagið.

Faroe Petroleum hevur 13 leitiloyvi á Atlantsmótinum.

### Stóran týdning fyri økið

Tað er greitt, at tess fleiri altjóða oljufeløg koma uppí leitingina eftir olju og gassi á leiðunum vestan fyri Hetland, tvs. á Atlantsmótinum, tess størri møguleiki er fyri at menna alt økið, sum liggur millum Hetland og Føroyar. Hetta kann tí fáa stóran týdning fyri leitingina sum heild. Sum nevnt eru áhugin ikki minst knýttur at Corona rygginum, sum liggur upp at føroyska markinum og í onkrum føri gongur inn á føroyskt øki. Talan er m.a. um leitiloyvið 005, sum ENI og Føroya Kolvetni standa fyri. Feløgini hava bundið seg til at bora brunn í Anne Marie prospektinum næstu tvey árini. Og tað er greitt, at fer Føroya Kolvetni (Faroe Petroleum) at halda fram við sínum handilspolitikki, sum er at selja part av sínum loyvum, so er ikki óhugsandi, at onnur oljufeløg fara at keypa part av partinum hjá Faroe Petroleum í 005 loyvinum á føroyskum øki eisini. Tað ljóðar, at fleiri feløg eru sinnað at farma inn í hetta loyvi, sum eisini sigst vera lovandi. Tað er greitt, at við at fáa eitt nú japonsk peningasterk feløg og onnur við upp í leitingina á Atlantsmótinum, tvs. bæði vestan fyri Hetland og á føroyska landgrunninum, so hevur Faroe Petroleum á henda hátt eisini birt uppundir áhugan fyri økinum øllum, nakað, sum eisini leitingin við Føroyar kann fáa gagn av.

# BP boring útsett til september

**Oljufelagið BP lat í farnu viku Jarðfeingi umsókn um boriloyvi á landgrunninum í summar. Vegna seinking í boring hinumegin markið er boringin hjá BP útsett til í september**



*BP stjórin, Hjarnar Djurhuus letur stjóranum á Jarðfeingi, Sigurð í Jákupsstovu erskjurnar við allari boriverkætlanini "William"*

*Mynd Jens K Vang*

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eitt av heimsins størstu oljufeløgum, BP lat í vikuni føroysku oljumyndugleikunum Jarðfeingi endaligu umsóknina um at bora á landgrunninum í summar. Tað var stjórin sjálvur, Hjarnar Djurhuus, sum handaði Jarðfeingi umsóknina. Slík umsókn skal latast myndugleikunum ummleið tríggjar mánaðir, áðrenn sett verður á at bora.

Talan er um at bora Williambrunnin inni á basaltinum í summar. Samtíðis sum umsóknin varð latin inn, hevur BP fingið at vita frá boripallfelagnum Transocean, at boripallurin Transocean Rather ikki verður klárur til boriuppgávuna á føroyskum øki fyrr enn einaferð í september. Orsøkin er tann, at boripallurin er vorðin seinkaður nakað, nú hann borar fyri Chevron hinumegin markið. Tað hevur verið gitt, at boringin fór at verða úsett, nú veður hevur tarnað arbeiðinum á Rosebankøkinum nógv. Eisini hevur verið gitt út frá verandi støðuni, at boringin fór kanska at verða útsett til í næsta ár. Ta avgerðina mugu vit so bíða við at frætta um, tí enn er so ætlanin at bora í september.

Í løtuni er boripallurin í ferð við at bora annan av trimum brunnum fyri Chevron. Ætlanin var annars, at BP skuldi seta borin í einaferð í juli. Hjarnar Djurhuus sigur við Sosialin, at teir vóna at kunna seta á í september. Í løtuni verður arbeitt við at fáa avtalur í lag við undirveitarar, her ikki minst føroyskar.

Umframt BP eru Shell og Anadarko partur av hesi boriætlanini. Hetta verður so aðru ferð, at tað verður sett á basaltið inni á landgrunninum. Fyrstu ferð varð í fjør tá eitt samtak við Statoil sum fyristøðufelag boraði Brugduna. Úrslitið av tí boringini var, at eingin olja varð funnin, men stór tøknilig framstig vórðu gjørd. Williambrunnurin er eitt úrslit av tveimum brunnum, sum BP og Shell høvdu bundið seg til at bora í landssynningshorninum av landgrunninum, men sum feløgini heldur ynsktu at flyta inn á basaltið. Og endin á tí varð, at BP og Shell saman við Anadarko peikaðu út eitt egnað stað á loyvinum hjá Anadarko og her bora ein brunn, sum er mettur at kosta eins nógv og tveir brunnar í tí sokallaða "Gullhorninum".

## Atlantic Petroleum borar í bretskum øki

**Talan er um Balgownie prospektið, sum er í loyvi P1228. Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum gerst støðugt meira og meira virkið í oljuvirkseminum á bretskum øki. Nú um dagarnar varð borurin settur í Balgownieøkið**

OLJA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Herfyri keypti felagið seg inn í leitiloyvi í Norðsjónum við 15%, og nú hevur oljusamtakið við Endeavour Energy so sett á undirgrundina. Henda boringin er ein trimum leitibrunnum, sum føroyska oljufelagið er partur av í hesum árinum. Wilhelm Petersen, stjóri fegnast um gongdina og sigur, at luttøkan í boring á bretskum øki er partur av strategiini hjá felagnum at kunna vera við til at framleiða olju og gass komandi árini. Parturin hjá føroyska felagnum fyri at vera við í boringini er 34 mill. kr.